UTTAN ÚR HEIMI

# Ísakalt millum Russland og Ukraina



*Á midnátt gamlaárskvøld minkaði trýstið á gasskranunum í Ukraina*

*Mynd: Reuters*

**Nýggjársdag frysti trý stig í Moskva og tvey í Kiev, men politiskt er tað munandi kaldari**

ÓSEMJA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Stutt fyri midnátt gamlaárskvøld byrjaðu teknikarar hjá russiska gassfelagnum Gazprom at skrúva trýstið niður á kranunum til Ukraina, eftir at ukrainska stjórnin hevði sýtt fyri at góðtaka tað seinasta sáttmálatilboðið úr Moskva. Tað ber í sær, at ukrainar fáa ikki teir 120 milliónir rúmmetrarnar av gassi, sum landið hevur brúk fyri um dagin.

Men ukrainar hava kortini ein møguleika, tí teir kunnu fáa sær burtur av gassinum, sum russar senda til Vesturevropa ígjøgnum leiðingar, sum liggja ígjøgnum Ukraina. Tað vilja russar ikki góðtaka, men ukrainar siga seg hava rætt til 15 prosent av gassinum til Evropa aftur fyri, at leiðingarnar ganga ígjøgnum Ukraina.

Stríðið ímillum Russland og Ukraina er eitt stríð um prísin á russiska gassinum. Higartil hevur Ukraina goldið 50 dollarar fyri hvørjar 1.000 rúmmetrar av gassi, men Gazprom vil hava 230 dollarar, sum er tað, ið hini londini í Evropa gjalda. Ukraina vil hava eina tillagingartíð og er sinnað at gjalda 80 dollarar ta fyrstu tíðina, men Gazprom sigur nei.

Ukraina hevur skrivað undir sáttmála við Turkmenistan um at fáa gass haðani fyri 65 dollarar fyri 1.000 rúmmetrar, men trupulleikin er, at tað gassið má flytast ígjøgnum Russland.

Stjórnin í Kiev hevur lovað ukrainska fólkinum, at tey skulu ikki sita køld í vetur, men verður kreppan ikki loyst skjótt, kann hon ávirkað viðurskiftini á flestu ukrainum. Hon kemur heldur ikki Viktor Jusjtsjenko, forseta serliga væl við. Hann hevur longu mist ein part av sínum góða umdømi, tí ukrainar halda seg ikki hava fingið nóg nógv burtur úr valdsskiftinum, og gasskreppan bøtir neyvan um umdømi hansara, skrivar AP.

# Kuldin kann krevja fleiri mannalív enn jarðskjálvtin

**Tað frystir meiri enn tíggju stig í fjøllunum í Pakistan og Kashmir nú, har túsundtals fólk royna at lívbjarga sær í tjøldum. Umleið 100 børn eru longu deyð í kulda**

NEYÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani tann harða jarðskjálvtan í Pakistan og Kashmir tann 8. oktober hava hjálparfelagsskapir og pakistanski herurin roynt at útvega teimum nógvu heimleysu tjøld og teppi til veturin. Men tað hevur verið trupult at fáa útgerðina fram í teimum høgu fjøllunum. Tí eru tað framvegis mong, sum lítla og onga hjálp fáa, og um stutta tíð fer kavin at kvetta alt sambandið við tær nógvu fjallabygdirnar.

Tað sigur hjálparfelagsskapurin Kashmir International Relief Fund, sum eisini veit at siga, at á leiðini kring býin Muzzaffarabad í pakistanska partinum av Kashmir eru umleið 100 børn deyð í kulda tann seinasta mánaðin.

Samstundis kæra hjálparfelagsskapirnir seg um, at útgerðin, sum teir hava fingið, er ikki nóg góð. Joan Lane, sum arbeiðir hjá einum av felagsskapunum, sigur við bretska blaðið The Independent, at fleiri túsund fólk hava fingið tjøld, sum vísa seg at vera óbrúkilig um veturin. Tey hoykna stutt sagt undan kavanum, sigur hon. Tað sama sigur altjóða hjálparfelagsskapurin IOM, sum vil vera við, at tríggir fjórðingar av tjøldunum eru als ikki egnað sum vetrarbústaðir hjá fólki.

Samstundis hevur ST boðað frá, at næstan ein millión fólk hava eingi teppi fingið enn.

Pakistonsku myndugleikarnir meta, at 3,5 milliónir fólk eru heimleys. Tey flestu hava leitað sær skjól í stórum tjaldlegum, men mong eru enn í teimum smáu fjallabygdunum. Tey tora ikki at fara haðani, tí tey eru bangin fyri at missa jørðina og húsdjórini, tí tað eru bara tey fægstu, sum hava nakað skjal, sum sigur, at tey eiga jørðina.

## Vælferðin kvalir kinesarar

Tey seinastu 25 árini hevur búskaparvøksturin í Kina verið umleið níggju prosent í meðal, men nú noyðist tann mannsterka tjóðin at sanna, at vælferðarvøksturin krevur sín prís.

Í stórbýunum er luftin so illa dálkað, at tey flestu noyðast at fáa sær okkurt fyri andlitið, fara tey út í ferðsluna, og nógvar áir eru so illa dálkaðar, at tað er vandamikið ar drekka úr teimum. Og tað verður verri enn, tí sambært umhvørvisstýrinum í Beijing verður dálkingin fýra ferðir verri um bara 15 ár, um myndugleikarnir ikki taka onkur stig til at avmarka ta ovurstóru orkunýtsluna.

Bæði politikarar og fjølmiðlar hava í mong ár fegnast um gongdina í búskapinum, men í seinastuni hava fjølmiðlarnir lagt á annan bógv, skrivar Reuter. Eftir at ein spreinging á einari verksmiðju dálkaði eina á herfyri, skrivaði Fólksins Dagblað, at tað hjálpir so lítið at reinsa ta einu ánna, tí tað fara at ganga mong ár, áðrenn teir 300 milliónir bøndurnir fáa reint vatn. Umhvørvisfelagsskapir halda, at 70 prosent av áunum og vøtnunum í Kina eru illa dálkað, og at umleið 1.000 vøtn eru tornað upp tey seinastu fimmti árini.

Ein stór orsøk til ta stóru luftdálkingina í stórbýunum er tann skjótt veksandi bilferðslan. Fyri fimm árum síðani keyptu kinesarar fýra milliónir bilar um árið, men um tíggju ár verður tað talið 13 milliónir. Tað merkir, at í 2020 vera 130 milliónir nýggir bilar í Kina. Mátað eftir fólkatalinum er tað tað sama sum í USA.

## Fleiri danskar vindmyllur

Áhugin fyri donskum vindmyllum er stórur, og í jólavikuni fekk verksmiðjan Vestas í Ringkøbing tvær bíleggingar úr Fraklandi og Týsklandi.

Tann seinna bíleggingin, sum var frá týsku orkufyritøkuni Voltwerk, umfatar 20 stórar myllur, sum eru 2 MW hvør, og tær skulu eftir ætlanini setast upp á einum orkuverki har suðuri í Bayern. Sambært leiðsluni í Vestas er týska bíleggingin 280 milliónir krónur verd, men leiðslan hevur kortini kunngjørt, at tann franska og tann týska bíleggingin fáa onga ávirkan á rakstrarúrslitið hjá fyritøkuni í rakstrarárinum 2005-2006.

## ES skal bøta um umdømið



Á nýggjárinum tók Eysturríki við formansskapinum í Evropasamveldinum, og eysturríkska stjórnin hevur longu boðað frá, at hennara fremsta mál verður at gera ES betur umtókt ímillum fólk.

Tað er eisini neyðugt, tí kanningar hava víst, at samveldið er so illa umtókt ímillum sínar egnu borgarar sum sjáldan fyrr. Eitt nú vísa kanningarnar, at bara triði hvør ES-borgari heldur tað vera skilagott at hava ein slíkan evropeiskan felagsskap, og í Eysturríki sjálvum er tað bara fjórði hvør, sum heldur tað.

- Okkara fremsta mál má vera at gera tað lættari hjá fólki at skilja skipanina, so tey eisini fáa eyga á ágóðan, sigur eysturríkski uttanríkisráðharrin, Ursula Plassnik.

## Forsetaval aftur útsett

Tað gongst illa hjá teimum politisku pørtunum í Haiti at semjast um, nær fólkið skal velja nýggjan forseta. Í síðstu viku vóru partarnir annars samdir um at halda valið á nýggjárinum, men semjan helt ikki, so nú er valið útsett - fyri fimtu ferð.

Haiti hevur ligið í forsetaloysi, síðani Jean Bertrand Aristide varð koyrdur frá fyri tveimum árum síðani. Síðani hava hermenn hjá ST roynt at tryggja lóg og landaskil, til nýggjur forseti er valdur, men tað sær út til at taka sína tíð.